# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Vit fingu fyrst og fremst eitt gott tilboð frá NSÍ, og hesum hugdu vit at*

*Steinfinnur Mittelsen, P/F Havnar Fótbóltur*

# Gylti skógvurin vendir heim

**Seinasta dagin, sum flytingarvindeygað var opið, hendu hópin av spælaraskiftum kring alt landið. Ikki minst vakti tað ans, at Christian Høgni Jacobsen nú aftur skal spæla við NSÍ eftir hálvt kappingarár í HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Flytingarvindeygað hjá føroysku fótbóltsfeløgunum læt aftur á midnátt í gjárkvøldið. Væntast kundi, at nøkur spælaraskifti skuldu avgreiðast í seinastu løtu, men at aktiviteturin gjørdist somikið stórur, høvdu tey fægstu helst roknað við.

### Álopskarusel hjá teimum stóru

Størsti handilin í so máta var helst, tá NSÍ og HB komu ásamt um, at Christian Høgni Jacobsen komandi hálva árið er partur av hópinum hjá NSÍ. Við hesum fær NSÍ spælaran aftur, sum tvær ferðir hevur skotið seg til gylta skógvin, men sum í HB als ikki megnaði at vísa máltevið, sum hann at kalla hvørt ár hevur sýnt í NSÍ.

Í veruleikanum var talan um eina karusell, sum fór ígongd, tá Andrew av Fløtum kom aftur til HB at spæla. Undan hesum ljóðaði, at B36 eisini hevði ligið framvið eftir undirskrift hansara, men tá tann royndin miseydnaðist, noyddist felagið at leita aðrar vegir. Samstundis ljóðaði, at runavíkingar vildu sleppa sær av við Anderson, sum hóast mál síni ikki hevur trivist so væl í Runavík, og tað gjørdi B36 sær dælt av.



*Hóast Formkula-málini í HB-troyggjuni einans gjørdust trý á hesum sinni, so er lítil ivi um, at NSÍ í Christian Høgna Jacobsen hevur fingið ein tann vandamesta spælaran í føroyskum fótbólti aftur á liðið*

*savnsmynd*

### Leigusáttmáli

Hóast trupulleikar, so hevði NSÍ neyvan slept toppskjúttanum, um ikki onnur loysn var í eygsjón. Tað er eingin loyna, at felagið hevur arbeitt hart við at finna nýggjan áleypara, og venjingin hjá felagnum var ikki meira enn byrjað mánakvøldið, áðrenn junglutrummurnar fóru ígongd. Hetta tí Christian Høgni Jacobsen var millum teirra, sum vóru at síggja á vøllinum.

Vit fingu fyrst og fremst eitt gott tilboð frá NSÍ, og hesum hugdu vit at. Fíggjarliga er tað jú altíð ein spurningur, hvussu nógvar spælarar tú kanst hava í hópinum, og ítróttarliga skuldu vit eisini gera av, hvørt tað var ráðiligt at lata spælaran skifta í annað felag. Og í so máta ávirkaði tað sjálvandi avgerðina, at vit nú eisini hava Andrew í hópinum, sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur.

Eg skal á ongan hátt geva Christian Høgna skuldina fyri okkara úrslit í ár. Men tað er ein sannroynd, at hann – eins og restin av hópinum – ikki hevur livað upp til tað, sum vit høvdu vónað í ár. Og tí var talan kanska um skilagóða loysn, nú hann aftur fer at royna seg í NSÍ. Hinvegin er sáttmálin við spælaran eisini galdandi fyri 2008, so vit hava framvegis fult álit á, at hetta er ein spælari, sum kann styrkja um hópin, sigur HB-stjórin.

Og eisini í NSÍ eru tey fegin um, at tað hevur eydnast at fáa fyrrverandi toppskjúttan aftur í hópin.

Vit vita, hvørjar dygdir Christian Høgni hevur sum áleypari, og ivast í onga løtu í, at talan er um ein veldugan styrk, nú vit fingið hann heimaftur, staðfestir NSÍ-formaðurin, Dánjal Petur Højgaard á heimasíðu felagsins.

# Flott avrik á Man

**Ikki færri enn 13 heiðursmerki gjørdist talan um, tá føroyska fimleikalandsliðið kappaðist á fimleikaoyggjaleikum á Isle of Man í farnu viku**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast bert tvey av vunnu heiðursmerkjunum vóru úr gulli, so bóru úrslitini sítt sjónliga prógv um, at føroyskur fimleikur væl og virðiliga er á rættari kós. Ikki minst, tá hugsað verður um, at vanliga sterkastu føroysku kortini, Helgi W. Olsen og Marit Magnussen, ikki vóru partur av føroyska liðnum hesaferð.

Men maður kemur í mans stað (M/K) verður sagt, og soleiðis var eisini hesaferð. Gutti Harryson og Silja Højgaard vunnu sær hvør sitt gullmerki, og hartil gjørdist talan um ikki færri enn ellivu onnur heiðursmerki hjá føroyska liðnum. Eit avrik, sum eisini varð virðismett sera høgt av fimleikasambandinum, sum skipaði fyri móttøku, tá fimleikararnir komu aftur til Føroya sunnumorgunin.

## Føroysku heiðursmerkini

| | |
|---|---|
| **Gull** | |
| Gutti Harryson | Ringar |
| Silja Højgaard | Lop |
| **Silvur** | |
| Manslandsliðið | Liðkapping |
| Rósing Dam | Gólv |
| Øssur D. Eiriksfoss | Lop |
| Rósing Dam | Gólv |
| Gutti Harryson | Ringar |
| Høgni R. Øster | Reck |
| Elinborg T. Durhuus | |
| **Bronsa** | |
| Kvinnulandsliðið | Liðkapping |
| Fróði Mortensen | Lop |
| Øssur D. Eiriksfoss | Lop |
| Elinborg T. Durhuus | Lop |

# Ble til AB

**Sterki miðvallarin hevur leingi vilja úr VB/Sumba, og nú skal hann spæla á Argjum, har hann skal avloysa Vagn Mohr Mortensen á sentrala miðvøllinum. VB/Sumba hevur tó eisini sín avloysara kláran**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seint í gjárkvøldið kundi leiðslan í VB/ Sumba vátta, at Evrard Blerestina av kappingarárinum fer at spæla fótbólt á Argjum.

Við hesum hevur VB/Sumba slept ein av sínum týdningarmestu spælarum til liðið, sum saman við suðuroyingunum roynir at vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna, og tað í sjálvum sær er merkisvert.

Hinvegin er tað neyvan nøkur loyna, at Ble seinastu tíðina hevur roynt at sleppa úr felagnum. Longu í fjør ljóðaði, at B36 royndi at fáa spælaran í sín hóp, men tann handilin varð tó av ongum.

Og at VB/Sumba hevur verið uttanlands og leitað sær styrk bendir eisini á, at leiðslan í longri tíð hevur verið greið um, at tað skilabesta helst var at loyva einum ónøgdum spælara til annað felag.

Heilt á berum standa teir tó ikki á Eiðinum. Felagið hevur í vár verið í sambandi við serbiska Marko Moravcic, og í gjárkvøldið kom so fráboðan um, at hesin verður partur av hópinum tað, sum eftir er av kappingarárinum.

Tað verður Henning Joensen eisini. Evnaríki vágbingurin hevur seinasta árið roynt seg í B36 og í B68, men nú verður tað so aftur í VB/Sumba, at hann skal spæla.